Semja

millum Fíggjarmálaráðið

og

Føroya Pedagogfelag

**1. Eftirløn til tímalønt**

Nýggj áseting um eftirløn til tímalønt galdandi frá 1. apríl 2020.

Í § 30, stk. 1 c í sáttmálanum fyri pedagogar og í § 21, stk 1 c í sáttmálanum fyri hjálparfólk verður sett inn nýggj áseting:

> ”Tímaløntir pedagogar og tímalønt hjálparfólk, sum arbeiða meira enn 59 tímar um mánaðin, fáa sama eftirlønargjald sum fastlønt fyri teir mánaðir, arbeitt verður meira enn 59 tímar um mánaðin. ”

Viðmerking: Hetta verður avgreitt fyri hvønn mánað sær.

**2. Tvær setanir**

Um pedagogar ella hjálparfólk afturat sínum høvuðsstarvi arbeiða í aðrari Eind í Almannaverkinum, eru bæði høvuðsstarv og hjástarv at meta sum hvør sín sjálvstøðuga setan, tá ið talan er um samsýning og uppgerð av arbeiðstíð.

**3. Annað**

- Frá 1. oktober 2019 fáa tænastumenn á stigi 38 eina ikki eftirlønargevandi viðbót á kr. 273,16 um mánaðin.
- Tímaløn til tænastumenn á stigi 32, 33 og stigi 38 verður ásett við støði í bæði grundlønini og teirri ikki eftirlønargevandi viðbótini. Hetta galdandi frá 1. apríl 2020.
- Markið 15 tímar fyri partíðarsetan í § 4, stk. 1 í pedagogsáttmálanum verður strikað. Galdandi frá 1. apríl 2020.

Tórshavn tann 24. mars 2020

Føroya Pedagogfelag Fíggjarmálaráðið